TING-HELLAN

# Umráðandi við langtíðarmálum

**Visión 2015:**

- **Ein fyritreyt fyri, at hesin partur av visjónini gerst veruleiki, er, at vit politikarar, lærarar, foreldur og myndugleikar hava sama mál. Tað mál, at hvørt barn og hvør ungdómur skal sleppa at menna eginleikar sínar til fulnar – einki annað er nóg gott.**

*Okkara mál er tí:*
- **at allir fólkaskúlanæmingar fáa eina góða og mennandi grundútbúgving, sum tryggjar, at teir hava førleika at fara víðari til eina miðnámsútbúgving**
- **at allir ungdómar fáa eina miðnámsútbúgving ella yrkisútbúgving**
- **at minst helvtin av okkara ungdómi fær hægri útbúgving**

Kelda: Ólavsøkurøða løgmans: www.logting.fo

- Vit eru so smá og tí kunnu vit ikki hava allar útbúgvingar á hægri stigi í Føroyum, men tað er umráðandi at seta sær langtíðar mál, sigur landsstýrismaðurin í skúlamálum, Jógvan á Lakjuni

**ÚTBÚGVING**
*Solby A. Eliasen*
solby@mail.djh.dk

Nakrar útbúgvingar á hægri stigi kunnu takast í Føroyum. Eitt nú bachelor í samfelagsfrøði, søgu og biologi. Til ber eisini til dømis at lesa føroyskt á Fróðskaparsetrinum. Útbúgving sum sjúkrarøktarfrøðingur, lærari ella pedagogur ber eisini til at taka í Føroyum. Men ongin master útbúgving kann takast í Føroyum. Tað er ein tanki, sum politiski myndugleikin hevur tikið til sín, sambært Visjón 2015, sum løgmaður, Jóannes Eidesgaard, tosaði um í Ólavsøkurøðu sínari fyrr í summar. Í henni stendur greitt:

*"Vit ætla at seta á stovn ein lærdan háskúla, ið skal fevna um eitt nú hægru útbúgvingarnar á Fróðskaparsetrinum, útbúgvingar til sjúkrarøktarfrøðingar, lærarar og pedagogar eins og hægri útbúgvingarnar á Handisskúlanum. Somuleiðis eigur ein KT-kjarni við bacherlor-, master- og Ph.D.-útbúgvingum at verða skipaður, eins og ein masterútbúgving í løgfrøði."*



*Jógvan á Lakjuni heldur ikki, at Visjón 2015 bara er orð. Hann heldur, tað er gott, at myndugleikin torir at satsa út um valskeiðið*

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í skúlamálum, sær avgjørt eina master útbúgving í løgfrøði fyri sær.

- Eg haldi so avgjørt, at tað átti at verið møguligt at tikið ein yvirbygning til løgfrøði í Føroyum, so kundu fólk lisið fyrra partin aðrastaðni enn í Føroyum, greiðir landsstýrismaðurin frá.

### Trýst á pengapungin

Jógvan á Lakjuni ásannar trupulleikan við, at tey lesandi ikki koma aftur til Føroya.

- Hatta er ein trupulleiki, sum vit hava tosað um, og hvussu vit kunnu gera fyri at loysa hann, sigur Jógvan.

Hann greiðir frá, at ein tanki, sum hevur verið frammi er um endurgjald fyri ÚSUN stuðulin. ÚSUN er lestrarstuðul til teirra, ið taka teirra útbúgving uttan fyri Norðanlondini. Stuðulin veksur alsamt, og fíggjarnevndin hevur givið mentamálaráðnum boð um at endurskoða hendan postin. Við íblástri úr Íslandi er tankin um endurgjald íkomin. Tað gongur stutt sagt út uppá, at um tú ikki kemur aftur tl Føroya innan fyri eitt ávíst áramál eftir loknan lestur, mást tú gjalda stuðulin aftur. Um tú hinvegin flytir heimaftur, slepst undan afturgjaldingini.

Til afturgjaldingina hevði so verið talan um sera lagaligar gjaldstreytir. Jógvan setur spurnartekin við, hvørs tað er rætt, at Føroyar gjalda, og so koma hesi fólkini ongantíð aftur til Føroya at búgva. Hendan ætlanin er tó ikki ítøkilig, sum nú er. Tað er bert ein tanki, sum hevur verið uppi og vent í Tinganesi. Men tað broytir ikki tann veruleikan, at posturin ÚSUN stuðul veksur alsamt.

- Heldur vøksturin í ÚSUN fram, má okkurt gerast, sigur landsstýrismaðurin.

### Tekur undir við deplum

Tá ein fólkaskúli skal flytast ella niðurleggjast, krevst tað ein fólkaatkvøða, so tað er næstan ógjørligt at niðurleggja onkran av teimum smærru bygdaskúlunum, tí flestu fólk eru góð við teirra skúla. Men Jógvan á Lakjuni væntar, at onkur av teimum 63 fólkaskúlunum í Føroyum, verða niðurlagdir, so hvørt sum kommunusamanleggingarnar økjast.

- Men hetta er eitt kjak, sum eg slettis ikki ætli mær útí, tí hetta má vera upp til lokalsamfelagið at gera av, staðfestir landsstýrismaðurin.

Jógvan á Lakjuni kom í nakað av illveðri, tá hann herfyri úttalaði seg um, at HF-skeiðið í Klaksvík skal flytast, tá Norðoyatunnilin stendur liðugur um eitt hálvt ár ella so.

Hann sigur, at hann tekur undir við skúladepilsætlanunum. Tríggir deplar: Ein fyri Suðuroy, ein fyri Streymoy og ein fyri Norðoyggjar og Eysturoynna.

Tá tað kemur til miðnámsskúlar, sigur Jógvan á Lakjuni, at tað er neyðugt at rationalisera.

- Deplarnir gera, at tilboðini verða so fjølbroytt, og tað økir um valmøguleikarnar hjá teimum ungu millum tær ymsu vallærugreinarnar. Betraða vegakervið ger jú eisini, at tey ungu kunnu búgva heima og koyra ímillum í skúla. Hetta fer at gera, at talan kann verða um fjøltáttað tilboð, ið flest øll kunnu røkka heimanífrá, sigur landsstýrismaðurin, Jógvan á Lakjuni, at enda.

# Menna føroyska samleikan

Heidi Petersen, framsøgukvinna hjá Tjóðveldisflokkinum, heldur, at tað er av alstórum týdningi, at serføroysku lærugreinarnar verða styrktar í fólkaskúlanum – samstundis sum enska málið fær størri pláss, tí hon sær fyri sær, at um ikki so langa tíð, verða flestu hægri útbúgvingarnar á enskum

**ÚTBÚGVING**
*Solby A. Eliasen*
solby@mail.djh.dk

- Vit eiga at fáa hægri útbúgvingar á altjóða støði, og tí má enska málið styrkjast í føroyska fólkaskúlanum, sigur Heidi Petersen.

Við skúlaársbyrjan í ár fingu næmingarnir í fjórða flokki á fyrsta sinni enskt í fólkaskúlanum. Tveir tímar um vikuna hetta skúlaárið.

Fyri stuttum varð ein kanning almannakunngjørd, har føroysku fólkaskúlanæmingarnir lógu fremst, tá ið ráddi um at skilja enskt. Men sambært Heidi Petersen vóru úrslitini í mállæru og skriving ikki eins góð. Tí heldur hon, at tað hevur týdning at læra børnini enskt fyrr.

- Framtíðin er ikki Danmark, og hartil eru fleiri av útbúgvingunum í Danmark á enskum, tá ein fer undir hægri lestur. Tí fær okkara lesandi ungdómur brúk fyri at duga ensk flótandi, sigur Heidi Petersen og leggur afturat, at hetta ikki skal skiljast sum, at danska undirvísingin skal fyri borðið, fyri tað um størri dentur verður lagdur á tað enska.

- Vit eiga eisini at hava ein føroyskan fólkaskúla við sterkum føroyskum samleika, har undirvíst verður í føroyskum máli og mentan, føroyskari søgu og landalæru, føroyskari lívfrøði – ja, alt sum er við til at evna okkara føroyska samleika. Tí fólkaskúlin er grundarlagið, sigur Heidi Petersen.

### Tóm orð

Framsøgukvinnan hjá Tjóðveldisflokkinum rósti Jóannesi Eidesgaard, løgmanni, fyri røðuna á Ólavsøku, har hann tosaði um Visjón 2015. Heidi er fólkaskúlalærari, og skúlaverkið er eitt av hennara hjartamálum. Hon var vælnøgd við málini, sum samgongan hevur stungið út í kortið viðvíkjandi útbúgvingarskipanini í Føroyum. Men hon var vónbrotin, tá hon sá fíggjarlógaruppskotið, sum í hesum døgum er til viðgerðar í tinginum. Har er ongin økt játtan til skúlaverkið.

- Tølini tala fyri seg. Játtanin er stórt sæð tann sama, og tað tulki eg sum, at samgongan hevur onki at hava hatta í, slær Heidi Petersen fast.



*Heidi Petersen heldur, at føroyski fólkaskúlin skal verða eitt tekin um sterkan føroyskan samleika, har undirvíst verður í øllum lærugreinum út frá føroyskum grundarlagi – eitt nú landalæra, søga, lívfrøði, mál og mentan. Men samstundis hevur enskt eisini stóran týdning fyri eftirtíðina*

### Ein depil – fleiri skúlar

Heidi Petersen tekur undir við hugskotinum um skúladeplar, sum tann, ið verður bygdur við Marknagilsvegin í høvuðsstaðnum. Men harvið er ikki sagt, at allir skúlarnir skulu verða savnaðir á einum og sama staði, heldur hon.

- Tað kann saktans vera ein depil, fyri tað um skúlarnir fysiskt ikki liggja á sama stað, heldur framsøgukvinnan hjá største andstøðuflokkinum fyri.

Hon nevnir sum dømi, at fiskivinnuskúlin í Vestmanna kann hoyra inn undir skúladepilin í Marknagili, fyri tað um hann liggur í Vestmanna, at HF-skeiðið í Klaksvík kann hoyra inn undir ein depil í Eysturoynni og so framvegis.

- Eg haldi, at tað er tíð uppá, at føroysku politikkararnir seta seg niður at tosa um innihaldið í føroysku útbúgvingarskipanini. Síðani kunnu byggingarnar fara fram, sigur Heidi Petersen, framsøgukvinna Tjóðveldisfloksins, sum sjálv sigur seg vera sinnaða at kjakast um júst innihaldið í miðnámsskúlaútbúgvingini í Føroyum.